# Ein millión
## til at marknaðarføra Føroyar

Bjóðið verðini vælkomnari til Føroya at ferðast. Søkið nú um stuðul og verið við til at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál!

Ferðaráð Føroya bjóðar til samstarv um at marknaðarføra Føroyar sum ferðamál. Til endamálið eru 1.000.000 kr. settar av til serlig marknaðarátøk.

Milliónin skal nýtast soleiðis, at føroysk virki/feløg, ið fáast við ferðavinnu, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir eftir »krónu til krónu« háttinum. Hetta vil siga, at umsøkjarin letur eins stóra upphædd til verkætlanina, sum stuðul verður latin frá Ferðaráð Føroya.

### Verkætlanir

Minsti stuðul, ið verður latin einstakari verkætlan, er 50.000 krónur, og mesti stuðul er 250.000 krónur. Ganga fleiri saman um eina verkætlan, kann í serligum føri verða vikið frá hámarkinum, treytað av at verkætlanin er av slíkari stødd, at stuðul kann verða latin.

Nýskapandi tiltøk hava fyrimun. Verkætlanir, har tvey ella fleiri virkir/feløg ganga saman hava eisini fyrimun. Verkætlanin skal ikki vera partur av vanligu marknaðarrøktini. Stuðul verður ikki latin til faldarar, uttan so at teir eru beinleiðis knýttir at verkætlanini, ið søkt verður um stuðul til.

Tað ber til at samstarva við sambond uttanlands, men bara tann føroyski parturin í verkætlanini fær stuðul.

Stuðulin verður útgoldin, tá ið verkætlanin er framd í verki.

### Upplýsingar

Í umsóknini skal í øllum førum verða greitt frá

- endamáli
- kostnaðarætlan
- fíggjarætlan
- tíðarætlan
- samstarvspørtum

### Umsóknarblað

Umsóknir skulu sendast Ferðaráði Føroya á serligum umsóknarblaði, ið kann takast niður frá www.tourist.fo og sum annars er at fáa frá Ferðaráði Føroya.

### Umsóknarfreist

Umsóknarfreistin er 15. mai 2006.

REPROZ

Faroe Islands

Ferðaráð Føroya · undir Bryggjubakka 17 · Postsmoga 118 · FO-110 Tórshavn
Tlf +298 355 800 · Fax +298 355 801 · www.tourist.fo


# Leirvíkar kommuna nýggjan sløkkiliðsbil

**Leirvíkar Bygdarráð hevur samtykt at keypa nýggjan sløkkiliðsbil og sløkkiliðsútgerð. Samtykt er at keypa ein MAN-sløkkiliðsbil frá Sp/f Kjartani Simonsen í Klaksvík**



*– Orsøkin til, at vit keypa nýggjan bil og útgerð er, at kommunan eftir avtalu við Norðoyatunnilin eisini skal taka sær av sløkkiliðsuppgávum í Norðoyatunilinum, sigur Leirvíkar kommuna*

LEIRVÍK

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Leirvíkar kommunu verður sagt, at saman við nýggja sløkkiliðsbilinum fer kommunan eisini at keypa aðra útgerð til eldsløkking, eitt nú roykkavaraútgerð.

Leirvíkar kommuna hevur í løtuni ein gamlan sløkkiliðsbil, sum annars lýkur krøvini til Leirvíkar kommunu.

– Orsøkin til, at vit keypa nýggjan bil og útgerð er, at kommunan eftir avtalu við Norðoyatunnilin eisini skal taka sær av sløkkiliðsuppgávum í Norðoyatunilinum, og tað setir størri krøv til sløkkiliðið, sigur Leirvíkar kommuna.

Á heimasíðuni veit kommunan at siga, at nýggi bilurin verður uppbygdur, sum tað verður rópt, hjá Rosenbauer í Eysturíki og í Ringe í Danmark.

Leveringstíðin uppá ein slíkan sløkkiliðsbil er hálvt ár.




# ÁRSAÐALFUNDUR

**Boðað verður til ársaðalfundar í Ognarfelag Tryggingartakaranna fríggjadagin 5. mai, 2006 kl. 17 á Hotel Føroyum**

Dagsskrá:

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í 2005
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar og hvussu avlop sambært roknskapinum verður nýtt, sí § 29, stk. 3, í viðtøkum felagsins
3. Val av nevndarlimum
4. Val av grannskoðarum
5. Møgulig uppskot, ið nevndin, stjórnin ella umboðsfólk ynskja at viðgera
6. Ymiskt

Allir tryggingartakarar í P/F Tryggingarfelagnum Føroyum eru limir í felagnum og hava rætt til at møta á aðalfundinum, men skulu í seinasta lagi 5 dagar frammanundan aðalfundinum skrivliga boða høvuðsskrivstovu felagsins frá luttøku.

Tórshavn, tann 20. apríl 2006
Nevndin

OGNARFELAG
TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Tel 345600 · Faks 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo